SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Transport, Infrastructure and Labour

Tórshavn, 4. desember 2018
J.Nr.: S1008-039/18

**Heðin Mortensen**
**landsstýrismaður**

**Svar**

**upp á**

**skrivligan fyrispurning eftir tingskipanini § 52a nr. 37/2018 frá Honnu Jensen, løgtingskvinnu, um Gøtudalstunnilin**

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. **Hvør er støðan í málinum um tunnil millum Gøtu og Skálafjørðin og nær kann verkætlanin væntast at verða gjørd?**

**Svar til spurning 1**
Síðani farið var undir at planleggja Eysturoyartunnilin hevur ætlanin verið, at høvuðsferðslan til og frá Eysturoyartunlinum, Eysturoyarmegin, skal fara eftir vestara armi á Skálafjørðinum, til økini norðanfyri Gøtueiði. Gøtudalstunnilin er ein umráðandi partur av hesi ætlan. Partur av samlaðu ætlanini var gjørdur, tá ið umkoyringarvegur var gjørdur um Skála bygd fyri góðum 10 árum síðani. Og ætlanin umfatar eisini at gera veg um Skálabotn, so at høvuðsferðslan frá norðurøkinum koyrir uttan um bygt øki allan vegin til og frá Eysturoyartunlinum. Tunnilin er ein týðandi liður í útbyggingini av høvuðsvegakervinum, sum knýtir landið saman.

Ein tann mest ferðslutungi teinurin á landsvegakervinum er vegurin millum Skálafjørðin og Gøtudal. Ársmeðalferðslan í 2018 var 5.900 akfør um samdøgrið. Ein trupulleiki er, at ferðslan skal um Gøtueiði, sum liggur høgt (upp til 135 metra hædd) og vegurin er brattur. Hetta gevur serliga tungu ferðsluni avbjóðingar. Harumframt er nógv ferðsla gjøgnum bygt øki við Gøtugjógv, og tað er til ampa bæði fyri bygdina og tey, sum koyra ígjøgnum.

Landsverk mælir til, at Gøtudalstunnilin verður gjørdur sum skjótast, tað vil siga tann næsti stóri tunnil aftaná Norður um Fjall. Ferðslan í tunlinum verður um 4.000 akfør um samdøgrið. Best hevði verið, um hann var klárur, longu áðrenn Eysturoyartunnilin letur upp, tí hann er ein avleidd verkætlan av Eysturoyartunlinum. Serliga fyri fólk norðan fyri Gøtueiði, tað vil siga fólk úr Norðoyggjum umframt Eysturkommunu og Fuglafjarðar Kommunu, ger Gøtudalstunnilin stóran mun og ger nyttuna av Eysturoyartunlinum størri. Í hesum økinum búgva knapt 10.000 fólk í dag.

2. **Hvør er støðan í málinum um veg um Skálabotn, og nær kann verkætlanin væntast at verða gjørd?**

**Svar til spurning 2**
Verkætlanin er klár at bjóða út og er eisini boðin út tvær ferðir, seinru ferð í 2013, men avlýst aftur, tí nøktandi játtan var ikki til verkætlanina. Vegurin kann við fyrimuni gerast samstundis sum Gøtudalstunnilin, tí tá er tunnilsgrót tøkt nærhendis verkætlanini.

3. **Hvussu gongur við at gera eina dagførda heildarætlan fyri samferðslukervið í Føroyum?**

Samferðsluætlanin verður dagførd í løtuni og verður ætlandi liðug í februar komandi í 2019. Onkrir partar eru tó liðugt dagførdir, t.d. verkætlanir. Eftir ætlan, verður samferðsluætlanin løgd fyri Løgtingið til aðalorðaskifti í januar 2019.

Tað er umráðandi, at vegakervið er nøktandi til øktu ferðsluna, nú Eysturoyartunilin verður liðugur í 2020.

Tinganes, 4. desember 2018

Heðin Mortensen
landsstýrismaður